# Skúlar í eina øld

**Á hvítusunnu var hátíðarhald í Kvívíkar kommunu í sambandi við at í ár eru liðin 100 ár síðan skúlarnir í Leynum og Kvívík vórðu bygdir**

SKÚLAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hátíðarhaldið byrjaði við kirkjugongd í Kvívík, har Marjun Bæk, prestur, prædikaði og Kingosangur var at hoyra.

Ein framsýning við gomlum myndum og skúlabókum var í Kvívíkar skúla. Eisini var ein hugleiðingarløta, har skúlaleiðarin Bjarni Heinesen beyð øllum at vera vælkomin, og Viggo Johannesen greiddi frá um viðurskiftini, tá skúlin í Kvívík varð bygdur.

Somuleiðis greiddi Katrin Dahl frá um skúlagongd í 1940-unum og Heidi Petersen hugleiddi um 1960-árini. Skúlabørn og musikkskúlabørn sungu og spældu.

Í Leynum varð eitt tiltak á skúlaøkinum, har eitt tjald varð sett upp og ein framsýning av m.a. gomlum myndum var inni í skúlanum.

Soffi Egholm saman við skúlabørnum bjóðaði vælkomin til heimabakaðar køkur og kaffi. Anfinn Setberg hugleiddi um ymiskt úr Leynum og Jens Pauli í Dali greiddi frá skúlasøguni í Leynum, Skælingi og á Válinum.

Eisini søgdu fyrrverandi skúlanæmingar frá sínum upplivingum í skúlaárunum í Leynum og á Válinum.

Harumframt var felagssangur og skúlabørnini sungu. Aftaná var náttúrði.



*Gamli skúlin í Kvívík er kommunuskrivstova í dag*



*Í Leynum varð eitt tjald sett upp á skúlaøkinum*



*Leynabørn syngja undir leiðslu av Jens Paula í Dali*



*Skúlaleiðarin Bjarni Heinesen*








*Næmingar í øllum aldri vóru til skúlaføðingardag*